Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	21-01-2026
Mál nr.:	24/00752
Málsviðgjørt:	HW
Ummælistíð:	Frá 20.november 2025 til 18. desember 2025
Eftirkannað:	22.01.2026

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan
(Ásetingar um skipan av landsroyndum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 93 frá 7. mai 2025, verður § 14, stk. 4 orðað soleiðis:

"*Stk. 4.* Landsstýrisfólkið skipar fyri landsroynd í føroyskum og støddfrøði í 4. og 6. flokki, og í náttúru og tøkni í 6. flokki eftir nærri ásettum reglum. Landsstýrisfólkið kunnger miðalúrslitið fyri landið í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni og almannakunnger samstundis frágreiðing um royndarúrslitið. Royndarúrslitini hjá einstaka næminginum, sbr. tó stk. 7, flokkinum ella skúlanum, eru í trúnaði. Starvsfólk skúlans o.o., sum taka ímóti ella viðgera úrslitini í landsroyndini, hava tagnarskyldu um hesar upplýsingar."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2026.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Í oktober 2024 handaði táverandi Fólkaskúlaráðið eitt tilmæli viðvíkjandi landsroyndum til landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum.
Fólkaskúlaráðið mælti til, at landsstýrismaðurin skuldi seta ein arbeiðsbólk at viðgera tilmælini hjá Fólkaskúlaráðnum nærri og at fáa til vegar neyðugt grundarlag fyri støðutakanini um eftirmetingarskipan í fólkaskúlanum, har støða eigur at verða tikin til neyðugar broytingar, tillagingar, uppfylging og dagliga umsiting av økinum.

Landsstýrismaðurin hevur tikið hesi ráð til sín og hevur nú sett gongd á arbeiðið at hyggja at hesum økinum heilt grundleggjandi, har alt hetta økið verður viðgjørt, endurskoðað og nágreinað, harímillum í mun til innihald og nýtslu av úrslitum av landsroyndunum. Sum skjótast verður arbeiðsbólkur við viðkomandi pørtum settur at arbeiða við hesum. Arbeiðsbólkurin verður eftir ætlan mannaður við umboðum fyri myndugleikarnar, Námsvísindadeildina, Nám og øðrum møguligum viðkomandi pørtum.

Hetta er eisini í samsvari við samgonguskjalið, har tað stendur, at landsstýrið m.a. vil endurskoða landsroyndir saman við avvarðandi pørtum.

Tó er tað ein broyting, sum landsstýrismaðurin ynskir at fremja beinanvegin við hesum uppskotinum um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan, og tað er at avtaka landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki.
Hetta er eisini í samsvari við tilmælið frá Fólkaskúlaráðnum, har tað m.a. stendur soleiðis:
Fleiri mæla til at strika landsroyndina í náttúru og tøkni, í hvussu er í 4. fl., meðan hon kundi verið viðkomandi í 6. flokki, har eftirmett verður, um næmingarnir hava ognað sær grundleggjandi amboð í lærugreinapørtunum, sum teir skulu nýta frameftir í ávikavist alis- og evnafrøði, lívfrøði og landalæru.

Harafturat hevur landsstýrismaðurin javnan hoyrt frá ymsum fólkum innan skúlaverkið, at landsroyndin í náttúru og tøkni í 4. flokki átti at verið avtikin.

Eitt grundleggjandi mál við lærugreinini náttúra og tøkni er, at næmingarnir sjálvir uppliva og arbeiða við náttúruvísindaligum fyribrigdum. Teir skulu fáa møguleika at gera sínar egnu royndir, eygleiðingar og kanningar, sum menna teirra førleikar at arbeiða kannandi, verkliga og skapandi. Undirvísingin eigur at vera løgd til rættis soleiðis, at næmingarnir gjøgnum praktiskt virksemi og gransking kunnu brúka sítt forvitni, fáa vakt undran og áhaldandi menna sín áhuga og evni at granska og skapa – eisini við atliti at burðardyggari menning og nýhugsan.

Tá landsroynd er í náttúru og tøkni longu í 4. flokki, er vandi fyri, at ein ov stórur partur av undirvísingini í hesi lærugrein verður lagdur um eftir krøvunum frá landsroyndini. Hetta kann føra við sær, at nógv av tíðini, sum annars kundi verið nýtt til praktiskar royndir og upplivingar, í staðin verður brúkt til at venja royndarsnið og arbeiðshættir, sum eru tillagað til sjálva landsroyndina.
Fyri at røkka endamálinum við lærugreinini náttúra og tøkni, eigur undirvísingin í stóran mun at byggja á, at næmingarnir sjálvir sleppa at royna seg, annaðhvørt í starvsstovuni ella úti í náttúruni.

Náttúra og tøkni er ein nýggj lærugrein í 4. flokki, og júst tískil kann landsroyndin órógva undirvísingina serliga nógv hetta fyrsta árið. Lærugreinin eigur at byrja á ein hátt, sum styrkir áhugan hjá næmingunum, og sum gevur læraranum rúm at tillaga innihald og arbeiðshættir eftir tørvi hjá næmingunum. Við eini landsroynd longu fyrsta árið í hesi lærugrein er vandi fyri, at undirvísingin verður ov nógv stýrd av krøvum frá royndini – bæði í mun til innihald og arbeiðslag.

Um eingin landsroynd verður í 4. flokki í náttúru og tøkni, kann lærarin fáa betri umstøður at fylgja sjálvari námsætlanini við denti á praktiskum arbeiði, upplivingum og kanningum. Hetta hevði givið næmingunum betri møguleika at menna forvitni, arbeiðshug og áhuga fyri náttúruni og tøknini gjøgnum egnar royndir og upplivingar, sum eru grundarlagið undir lærugreinini.

Áðrenn hetta uppskotið er sent til almenna hoyring, hevur spurningurin viðvíkjandi møguliga at avtaka landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki verið til undanhoyringar hjá ávísum viðkomandi pørtum innan skúlaverkið. Svarini í sambandi við hesa undanhoyring tóku sum heild undir við landsstýrismanninum um at arbeiða víðari við at fremja hesa broyting.

1.2. Galdandi lóggáva

Í galdandi lóggávu er tað ásett í § 14, stk. 4, at landsstýrismaðurin skipar fyri landsroynd í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni í 4. og 6. flokki eftir nærri ásettum reglum.
Í tilmæli frá Fólkaskúlaráðnum til landsstýrismannin verður víst á, at fleiri mæla til at avtaka landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Høvuðsendamálið við hesi lógarbroyting um at avtaka landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki er at økja um áhugan, forvitnið og trivnaðin hjá næmingunum í føroyska fólkaskúlanum, serliga við atliti at lærugreinini náttúra og tøkni.

Endamálið við hesum uppskoti er, at undirvísingin í náttúru og tøkni í 4. flokki í minni mun skal verða stýrd av landsroyndum og landsroyndarúrslitum, og at undirvísingin heldur skal verða við til at stimbra gleðina og forvitnið hjá næmingunum eftir at læra, samstundis sum málið er at betra um læruúrtøkuna og trivnaðin hjá næmingunum.

Ætlanin er at fáa enn meira orku, gleði og dygd í hvønn einstakan undirvísingartíma í náttúru og tøkni í 4. flokki. Hetta samsvarar við økta tørvin á at stimbra áhugan hjá næmingunum til at nema sær náttúruvísindaliga vitan og førleikar.

Endamálið við broytingini er hervið, at næmingarnir í 4. flokki og í restini av miðdeildini fáa eina trygga, støðufasta og haldgóða førleikamenning innan náttúru og tøkni. Henda lærugrein hevur stóran týdning fyri menningina hjá næmingunum av undran, virkishugi og førleikum at kanna og skilja náttúru og tøkniligar samanhangir. Hon gevur næmingunum grundleggjandi vitan um, hvussu náttúran og tøknin virka, og leggur grundarlagið fyri víðari læru í náttúruvísindaligum og tøkniligum greinum.

Lærugreinin náttúra og tøkni hevur stóran týdning fyri menningina av hugburði, undran og arbeiðshátti hjá næminginum. Gjøgnum royndir, kanningar og samrøður lærir næmingurin at

seta spurningar, leita eftir svarum og fáa fatan av, hvussu náttúra og tøkni hava týdning fyri lívið og samfelagið.

Endamálið við broytingini er tískil, at undirvísingin í náttúru og tøkni í 4. flokki, skal verða minni stýrd av landsroynd, har tað í staðin verður stuðlað undir eina meira fleksibla, næmingatillagaða og motiverandi undirvísing, sum kann stimbra næminganna áhugamál, evni og førleikar, soleiðis at næmingarnir varðveita bæði orku, vilja, forvitni og natúrliga áhugan at læra um náttúru og tøkni.

Eitt av endamálunum er tí, at lærararnir fáa meira tíð, rúm og umstøður at hava fokus á at menna undirvísingina í náttúru og tøkni, samstundis sum næmingarnir fáa betri møguleikar bæði at varðveita sín áhuga, sín hug og sín eldhug at læra um náttúru og tøkni.

Fyrimunir við hesi broyting verða, at lærarar og næmingar kunnu hugsavna seg meira um undirvísing og læring, har margfeldi, fjølbroytni og ymiskleiki verða sædd sum styrkir, heldur enn ov eintýðugt og snævurtskygd bert at venja til landsroynd.

Lyklaorðið í hesum sambandi er fjølbroytt undirvísing (undirvísingardifferentiering), sum verður tillagað til fjølbroytni, so undirvísingin í náttúru og tøkni rúmar og stuðlar øllum næmingum á besta hátt, so flest allir næmingarnir taka virknan lut í undirvísingini og fáa fakliga, persónliga og sosiala úrtøku av undirvísingini í náttúru og tøkni.

Endamálið við at avtaka landsroyndina í 4. flokki er, at næmingarnir ikki verða órógvaðir av at megna eina ávísa roynd, men at næmingarnir heldur varðveita natúrliga forvitnið at læra alt tað innan náttúru og tøkni, sum vekir teirra áhuga.

Eitt av endamálunum er, at lærararnir kunnu menna undirvísingina í hesi lærugrein á ein meira skynsaman hátt, samstundis sum næmingarnir fáa betri møguleikar bæði at varðveita sín áhuga, sín hug og sín eldhug at læra um tøkni og náttúru.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við at avtaka landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki, sleppa næmingarnir undan at fara til roynd í hesi lærugrein, sum teir bert hava havt í minni enn eitt skúlaár.
Hóast lærugreinin byggir víðari á kunnleika og fimi, sum næmingarnir hava ognað sær í lærugreinini heimstaðarlæru tey fyrstu trý skúlaárini, so er náttúra og tøkni tó ein nýggj lærugrein, sum næmingarnir møta fyrstu ferð í 4. flokki.
Við at avtaka hesa landsroyndina nýtast næmingarnir ikki longur at handfara trýstið og líða undir væntanum um at klára eina landsroynd longu tað fyrsta árið, teir hava hesa lærugrein. Endamálið eigur heldur at vera, at næmingarnir varðveita gleðina og forvitnið við at læra um náttúru og tøkni, heldur enn at arbeiða móti einum ávísum úrsliti í eini roynd.

Náttúra og tøkni er í stóran mun ein verklig lærugrein, har næmingarnir kunnu læra ígjøgnum upplivingar og praktiskar royndir. Við at avtaka hesa landsroyndina í 4. flokki fáa næmingarnir meira orku og størri motivatión til at hugsavna seg um innihaldið í undirvísingini, har stýrandi drívmegin hjá næmingunum verður at læra gjøgnum egnar upplivingar og praktiskar royndir, soleiðis at teir við arbeiðsgleði og forvitni kunnu nema sær nýggjan og áhugaverdan lærdóm innan náttúru og tøkniliga økið.

Samlaða endamálið við hesum lógaruppskoti er at tillaga landsroyndirnar og skapa betri karmar fyri trivnað og læring hjá næmingunum. Undirvísingin í náttúru og tøkni í 4. flokki

skal í minni mun verða stýrd av landsroyndum, og í størri mun verða stýrd av natúrligum áhuga og forvitni at læra.

Ætlanin er, at gildiskoman fyri fyriliggjandi lógaruppskot verður sett til 1. august 2026.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Undirvísingarstýrinum, Námi, Sernámi, Námsvísindadeildini, Føroya Lærarafelag, Skúlaleiðarafelagnum, Næmingaráðunum, Fólkaskúlaráðnum, Føroya Pedagogfelag, Kommunufelagnum, Gigni, MEGD, Foreldrafelagnum Heim og Skúli, Frískúlunum Kelduni og Lítla skúla, umframt hjá aðalráðunum.

Av hesum hoyringarpørtunum nevndir omanfyri er ummæli komið frá Sernámi, Námsvísindadeildini, Føroya Lærarafelag, Umhvørvismálaráðnum, Uttanríkis- og vinnumálaráðnum og Heilsumálaráðnum.

Umframt hoyringarpørtunum nevndir omanfyri er hoyringarsvar komið frá skúlastýrinum á Skúlatrøð.

Hoyringarsvar frá einstøku pørtunum

Heilsumálaráðið metir ikki, at lógaruppskotið hevur serligar avleiðingar fyri heilsuøkið og hevur ikki aðrar viðmerkingar.

Umhvørvismálaráðið og Uttanríkis- og vinnumálaráðið boða í sínum svarskrivum frá, at tey ikki hava nakrar viðmerkingar til uppskotið.

Sernám hevur ongar viðmerkingar til hetta lógaruppskotið.

Skúlastýrið á Skúlatrøð tekur undir við broytingini og metir, at broytingin vil viðføra, at undirvísingin í náttúru og tøkni í 4. flokki í størri mun kemur at byggja á upplivingar, verkligt arbeiði og kanningar, sum eru grundarlagið undir lærugreinini, heldur enn at verða stýrd av eini landsroynd.

Føroya Lærarafelag stuðlar lógaruppskotinum um at avtaka landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki.
Lærarafelagið metir, at henda landsroynd órógvar undirvísingina, tí ov nógv orka verður brúkt til at fyrireika næmingarnar til royndina í staðin fyri at arbeiða breitt við lærugreinini.
Felagið vísir á vansan við, at undirvísingin í størri mun verður stýrd av tí, sum verður mátað í royndini, heldur enn innihaldinum og endamálinum við lærugreinini.
Føroya Lærarafelag leggur dent á, at lærugreinin eigur at vera merkt av verkligum royndum, eygleiðingum, kanningum og granskandi undirvísing, og at landsroyndin ger tað torførari at raðfesta hetta.
Lærarafelagið grundgevur við, at lærugreinin er nýggj í 4. flokki, og tí hevur royndin serliga stóra ávirkan júst tá, og hon kann gera byrjanina í lærugreinini minni forvitnis- og royndargrundaða.
Umframt at taka støðu til hetta ítøkiliga uppskotið, sigur Lærarafelagið í sínum svari, at tað er vert at umhugsa eina breiðari og yvirskipaða endurskoðan av endamálinum við landsroyndum meira, eitt nú um tað er rætt, at næmingar longu í 4. og 6. flokki skulu til slíkar royndir og fáa talmet.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at hoyringarsvarið frá Føroya Lærarafelag tekur undir við og er í samsvari við endamálið við hesum lógaruppskoti.

Námsvísindadeildin mælir frá at avtaka landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki.
Námsvísindadeildin vísir á, at landsroyndin er eitt amboð hjá myndugleikunum, har endamálið er at meta um skúlaskipanina og tryggja javnbjóðis fakligt støði kring landið.
Royndin er eitt týðandi granskingar- og eftirmetingaramboð, sum gevur dátur um førleikar og menning hjá næmingum, og sum kann nýtast til at menna undirvísingina.
Verður landsroyndin avtikin, kann tað vera trupult at fáa hana inn aftur, og tí eigur varsemi at verða víst.
Deildin tekur tó undir við endamálinum um, at undirvísingin ikki skal vera stýrd av landsroyndum, og at næmingarnir skulu varðveita gleði og forvitni at læra.
Sambært Námsvísindadeildin eigur hetta verða loyst við betri reglugerðum og vegleiðingum um landsroyndir, heldur enn við at avtaka royndina.
Námsvísindadeildin mælir í staðin til, at lærugreinin náttúra og tøkni byrjar longu í 1. flokki, soleiðis at næmingarnir fáa eitt munandi sterkari fakligt grundarlag, áðrenn landsroynd verður skipað.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið tekur til eftirtektar viðmerkingarnar frá Námsvísindadeildini, har mælt verður frá at avtaka landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki, og í staðin til at styrkja støðið undir lærugreinini.
Ráðið metir tó framvegis, at endamálið við hesum lógaruppskoti er rætt og heldur tí fast við uppskotið óbroytt.

Undanhoyring
Áðrenn hetta uppskotið varð sent til almenna hoyring, var spurningurin um møguliga avtøku av landsroyndini í náttúru og tøkni í 4. flokki sendur til undanhoyringar hjá ávísum viðkomandi pørtum innan skúlaverkið.
Undanhoyringin hevði til endamáls at geva landsstýrismanninum eitt fakligt og praktiskt grundarlag fyri at taka støðu til, um arbeiðið við einum lógaruppskoti skuldi setast í verk.
Undanhoyringarsvar komu frá Undirvísingarstýrinum, Námi, Fólkaskúlaráðnum og Skúlaleiðarafelagnum. Eisini Føroya Lærarafelag og Námsvísindadeildin lótu inn undanhoyringarsvar og hava harumframt latið formell hoyringarsvar í sambandi við ta almennu hoyringina.

Í undanhoyringarsvarunum varð í høvuðsheitum víst á, at landsroyndin í náttúru og tøkni í 4. flokki kann órógva undirvísingina í eini lærugrein, sum er nýggj á hesum floksstigi, og at dentur í størri mun eigur at verða lagdur á upplivingar, verkligt arbeiði og kanningar.
Fleiri undanhoyringarpartar settu harumframt spurning við, um landsroyndir í náttúru og tøkni yvirhøvur eru eitt hóskandi amboð, bæði í 4. og 6. flokki.
Undanhoyringarsvarini vóru nýtt sum partur av at fyrireika lógaruppskotið, men eru ikki at meta sum formell hoyringarsvar, og eru tí ikki viðgjørd á sama hátt sum hoyringarsvarini í almennu hoyringini.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Hetta lógaruppskotið hevur avmarkaðar fíggjarligar avleiðingar.
Fyri landið merkir uppskotið eina árliga sparing upp á umleið 30.000 kr, ið stavar frá kostnaði í sambandi við fyrireiking og fyrisiting av landsroyndini í náttúru og tøkni í 4. flokki, herundir uppgávugerð og umsitingarligt arbeiði knýtt at royndini.

Fyri kommunurnar hevur uppskotið ongar fíggjarligar avleiðingar, tí avtøkan av landsroyndini hevur ikki við sær nakrar eyka útreiðslur ella nýggjar fyrisitingarligur skyldur hjá kommununnum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Prógvstovan fer at hava nakað minni av umsiting, tá henda landsroyndin verður avtikin.

Mett verður ikki, at uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki ávirkan á millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið er mett at vera í samsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum Føroyar hava bundið seg at.
Viðvíkjandi Hoyvíkssáttmálanum hevur uppskotið ongar avleiðingar, tá talan er um eina innanhýsis skipanarliga broyting í føroyska fólkaskúlanum, ið ikki viðvíkur frælsi at veita tænastur ella javnrætt millum føroyskar og íslendskar borgarar.
Uppskotið er somuleiðis í samsvari við Evropeiska mannarættindasáttmálan.
Avtøkan av einari landsroynd í 4. flokki hevur ikki við sær nakra skerjing av rættindum hjá næmingum ella foreldrum sambært sáttmálanum, herundir rættin til útbúgving.
Viðvíkjandi Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, hevur uppskotið ongar neiligar avleiðingar. Uppskotið broytir ikki rættin til javnbjóðis atgongd til undirvísing ella krav um hóskandi tillagingar.
Samanumtikið verður mett, at uppskotið er í fullum samsvari við nevndu millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skatt ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ongar skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur onga heimild til landsstýrismannin, stovn undir landinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1, nr. 1

Serlig viðmerking til § 14, stk. 4:
Við hesi broyting verður landsroyndin í náttúru og tøkni í 4. flokki avtikin. Hetta merkir, at frameftir verða landsroyndir í náttúru og tøkni í 6. flokki, umframt í føroyskum og støddfrøði í 4. og 6. flokki.

Til § 2

Áseting um gildiskomu er 1. august 2026.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 17. februar 2026

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá UVMR
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Umhvørvismálaráðnum
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá skúlastýrinum á Skúlatrød
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Sernámi
Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá Námsvísindadeildini
Fylgiskjal 8: Hoyringarsvar frá Føroya Lærarafelag